## Kaldbaksvegurin stongdur

Kaldbaksvegurin er stongdur fyri allari ferðslu frá í morgun klokkan níggju, og til seinnapartin mikudagin klokkan fýra. Landsverk skrivar soleiðis á heimasíðu sínari: "Vegna arbeiði hjá Fjarhitafelagnum verður vegastrekkið frá Sundi til íbindingina í Kaldbaksbotni stongt fyri allari ferðslu frá týsmorgni, 29. mai kl. 09.00 til mikudagin, 30. mai kl. 16.00."



## Smyril siglir til Italia-dystin

Komandi vikuskiftið hevur Strandferðslan broytt ferðaætlanina hjá Smyrli, so lagaligari er hjá suðuroyingum at koma til landsdyst.

Broytingin ger tað møguligt hjá suðuroyingum at ferðast aftur og fram á dystardegnum. Klokkan 17 verður siglt av Krambatanga, og klokkan 22 verður loyst av Havnini.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at hetta stig er tikið, tí dysturin hjá fótbóltslandsliðnum má sigast at hava serliga stóran áhuga kring alt landið.

n



*Vina Joensen og Randi Ward*

Sjálvt dagin í dag er Vina – hóast árini eftirhindini eru farin at tyngja eitt sindur – ótrúliga lívsglað, og tað er helst eisini orsøkin til, at hon hevur latið Randi Ward sleppa so nær inn at sínum lívi.

Undir øllum umstøðum ein fyrilestur, sum bergtók fólk og sum vísti, at tað á ongan hátt var av tilvild, at Randi Ward fekk eitt 11-tal fyri høvuðsuppgávu sína.

ljúp

fekk hon hjálpandi hond, segði Egon Hansen.

### Blíð og lættsint

Vina hevur verið ein útatvend kvinna, blíð og lættsint. Hon hevur ikki sæð myrkt upp á tilveruna og hevur hetta ivaleyst havt sín týdning fyri, at hon hevur megnað alt tað, hon hevur verið ígjøgnum. Vina læt seg ongantíð sláa út, men dugdi at »takla« tingini, tá tey komu.

Egon sigur, at hon er umtókt og er fólkakær. Tað sigur eisini nakað um Vinu, at hon tók sær av Pobbalenu, ið var systkinabarn til Martin bónda, sum aftur var abbi Vinu.

- Eg má siga, at hóast eg eri uppvaksin í Nólsoy, hevði eg ikki ímyndað mær hesa síðuna av Vinu. Frásøgnin hjá Randi prógvar, at Vina var ein sterk kvinna – bæði til likams og sálar, segði Egon Hansen.



*- Eg má siga, at hóast eg eri uppvaksin í Nólsoy, hevði eg ikki ímyndað mær hesa síðuna av Vinu. Frásøgnin hjá Randi prógvar, at Vina var ein sterk kvinna – bæði til likams og sálar, segði Egon Hansen*

Klárt til projektering:

# 30 nýggj grundstykkir í Djúpagili

**Býráðið hevur samtykt at seta hálva millión av til projektering av nýggjum grundstykkjum Millum Gilja**

ÚTSTYKKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tørvurin á grundstykkjum í Tórshavn er eyðsýndur. Bíðilistarnir eru langir, men nú ætlar býráðið at bøta eitt sindur um hetta. Samtykt er at seta hálva millión av til projerkering av 30 grundstykkjum í Djúpagili, Millum Gilja.

Útstykkingin liggur í náttúruvøkrum umhvørvi við áum og gilum, sum seinni blíva størri við Djúpagil. Ætlanin er, at avkoyring skal verða frá nýggja sambindingarvegnum til útstykkingina.




*Soleiðis fer ætlaða útstykkingin í Djúpagili at síggja út*

Útstykkingin skal halda fram við verandi útstykkingar fram við gilinum, niðan til nýggja sambindingarvegin og harvið eisini binda økini á báðum síðum av sambindingarvegnum meiri saman.

Pláss verður fyri 30 grundstykkjum til samans og møguleika fyri stovnsbygging eystanfyri. Hetta fer tó helst at krevja eina íbinding afturat í sambindingarvegin.

Sum nakað nýtt ætlar kommunan at gera grundøkini púra klár, tað vil siga at tey verða seld liðugt planerað. Stykkini verða 300 fermetrar við felags parkeringsøkjum, gøtusambondum og skipaðum friøkjum.

Eik víðkar um virksemið:

# Størsti internetbanki nú føroyskur

**Eik Banki hevur keypt SkandiaBanken, sum er størsti danski internetbankin við fleiri enn 115.000 kundum**

FÍGGJARVIRKSEMI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Eik Banki víðkar alsamt um sítt virksemi. Nú hevur samtakið keypt størsta danska internetbankan, SkandiaBanken.

Talan er um internetbanka burturav, og størsta av sínum slag í Danmark. SkandiaBanken skal leggjast saman við Eik Danmark, og fer framyvir at eita Eik.dk.

Kundarnir í nýggja Eik.dk er fyri tað mesta vællønt fólk, og bankin hevur størri innlán enn útlán. Hetta passar væl til eina samanlegging við Eik Danmark, tí har er talan um størri útlán enn innlán.

Við hesum keypinum veksur Eik samtakið munandi og telist nú millum 15 teir størstu bankarnir í danska ríkinum.

- Saman við virkseminum í dóttirbankanum Eik Danmark og øðrum týðandi íløgum í Danmark, styrkir keypið av SkandiaBankanum munandi okkara fótafesti á danska fíggjarmarknaðinum. Vit eru aktivt til staðar í Danmark, og nú økja og spjaða vit virksemið upp aftur meira, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka.

### Brúkaravinsamur

Innlánini í nýggja Eik.dk eru 5,9 milliardir, meðan útlánini liggja á 4,3 milliardum. Við økta virkseminum økist javnin í Eik samtakinum úr 12 heilt upp í 18 milliardir.

Bankin verður rikin víðari eftir sama leisti sum higartil, og upplýst verður, at brúkaravinsemi og kappingarføri eru hornasteinar, sum bankin er kendur fyri. Hann er eisini fleiri ferðir kosin fremsti internetbanki í ríkinum, umframt at hann í 2005 var kosin bíligasti bankin, tá um ómaksløn ræður.

Higartil hevur Eik ikki havt privatkundavirksemi í Danmark, men við keypinum av SkandiaBanken fær Eik fótafesti á hesum økinum eisini.

Vakstrarmøguleikarnir eru stórir. Bankin stendur sterkur millum kundarnar, og saman við góðu royndunum frá privatkundavirksemi úr Føroyum, verður SkandiaBanken rikin víðari eftir sama góða leisti, sigur Brian Toft, stjóri í Eik Bank Danmark.